

Songa Trym nærmast. Mynd: Songa Offshore

# Songa hevur sett 800 fólk í starv á boripallum í ár

**Jógvan Hugo Gardar**

02.10.2015 - 13:59

Oljan.fo

Meðan oljuvinnan stríðist við at finna fótafestið við lægri oljuprísum, og roynir at spara við at minka um virksemi og talið á starvsfólkum, so gongur Songa Offshore móti streyminum. Meðan flestu feløgini hava minka um starvsfólkatalið, so hevur Songa í ár sett 800 fólk í starv, skrivar Sysla.

Songa Offshore rekur í dag fimm boripallar, og skal hava fýra afturat í ár og í 2016. Songa hevur eisini havt tað fíggjarliga tungt, men kundi tá september var farin vísa á eitt samanhangandi ár uttan at pallarnir hava ligið stillir á norska landgrunninum.

Songa Offshore hevur Frederik W. Mohn sum størsta eigara umvegis eitt felag sum er skrásett á Kýpros, men Songa hevur sína rakstrarskrivstovu í Bergen.

Við teimum fýra nýggju boripallunum, sum hava ein kostnaðarkarm uppá 19 milliardir danskar krónur, so tykist framtíðin at síggja munandi bjartari út frá skrivstovuni hjá Songa, enn hjá flestu kappingarneytunum. Teir fýra nýggju boripallarnir hava allir átta-ara langar avtalur fyri Statoil.

Í samrøðu við Stavanger Aftenblad sigur stjórin í Songa Offshore, Bjørnar Iversen, at tey higartil í ár hava sett 800 fólk í starv, og um avtalan fyri ein av verandi pallunum, Songa Trym, verður longd, so verður talið nærri 1000.

Hann sigur víðari at tá tey fóru undir at byggja nýggju pallarnar, so var ein ótti tey høvdu, at trupult kundi gerast at fáa nóg nógv fólk til allar uppgavurnar, fólk sum høvdu royndir fra hesum arbeiðnum.

- Men vit hava als ikki havt trupult við at finna røttu fólkini. Vit hava hópatals umsøkjarar frá øðrum feløgum sum siga fólk úr starvi, sigur Iversen við Stavanger Aftenblad